

# Luft til vatn
## hitapumpur

Okkara dygd er tín trygd

demich

# Soleiðis riggar ein hitapumpa

Við einari luft til vatn-hitapumpu endurnýtur tú hitan í útiluftini til at upphita sethúsini og brúksvatnið. Samanborið við ein oljuketil og oljufýring, er hetta bæði ein umhvørvisvinarlig og orkusparandi loysn. Vit hjálpa tær allan vegin – frá ráðgeving og dimensjónering til uppsetan og staðseting av hitapumpu. Og ikki minst eftir montering við árligari viðlíkahaldsavtalu og døgntænastu.

### Hvussu fer hetta fram?

Hendan hitapumpan ger orkuna í útiluftini um til hita og heitt brúksvatn. Hitapumpan verður knýtt í sentralhitan í sethúsunum, haðani hon leiðir hita í radiatorar, samstundis sum hon hitar brúksvatnið til ynsktu hitastigini. Hitapumpan er drivin av el-orku og leverar eini 3-5 so nógva orku, sum hon fær at arbeiða við. Hetta ger hesa skipan sera rakstrardygga og meira orkusparandi enn t.d. ein oljuketil við fýring.

### Hitaloysnir til hvønn tørv

Tá tú velur eina hitaloysn, eru nógvir spurningar at seta og atlit at taka. Men tá tú velur hitaloysn frá okkum, veitst tú við vissu, at alt verður væl gjøgnumhugsað. Tær nýtist ikki eingongd at taka støðu til stødd og snið, tí tað gera vit fegin fyri teg. Vit syrgja fyri eini skipan, har raksturin er góður, samstundis sum tú fært júst ta hitaloysnina, tú hevur brúk fyri.

## Fyrimunir við hesari hitapumpuni

### Orkusparandi hiti

Hendan loysnin leverar umleið 3-5 ferðir so nógva orku, sum tú gevur henni at arbeiða við. Hetta ger hesa skipanina sera rakstrardygga.

### Umhvørvisvinarlig upphiting

Hitin frá eini slíkari skipan kemur frá varandi orku og er tí ein av teimum mest umhvørvisvinarligu loysnunum, sum eru.

### Ljóðleys

Luft til vatn-hitapumpur frá okkum eru sera ljóðleysar. Hetta ger, at eftir at hon er uppsett, fert tú ikki hoyra til nakran larm.

### Heildarloysn

Ein slík skipan sum hendan er ein heildarloysn til eini sethús. Hon hitar øll rúmini, samtundis sum hon ger heitt brúksvatn. Her hevur tú so at siga alt í einum.

Úrval

# **Luft til vatn** hitapumpur

Niðanfyri sært tú, hvørjar luft til vatn-hitapumpur vit bjóða, og hvørjir teir ítøkiligu eginleikarnir eru við hvørjari einstakari.





## Innieindir

| **Funktiónir** | **VVM 310** | **VVM 500** | **BA-SVM** |
|---|---|---|---|
| Appstýring | ✔ | ✔ | ✔ |
| Passar til F2120 | ✔ | ✔ | |
| Passar til AMS | | | ✔ |
| Farvudisplay og nýggjar funkur | ✔ | ✔ | |
| Størri heittvatnstangi | | ✔ | |
| Stødd innipartur | 1800 x 600 x 615 | 1900 x 763 x 900 | 1600 x 600 x 610 |
| Orkuflokkur | **A+++*** | **A+++*** | **A++** |

** saman við F2120*
*** saman við VVM*

**Tilkeyp**

Til hitapumpurnar finst mangt ymiskt, ið kann keypast til.

Her eru øll tilkeyp til okkara hitapumpur:

SMS 40 (Kommunikatiónsmodul til GSM)
POOL 310 (Til VVM310)
POOL 500 (Til VVM500)
SCA 35 (Sólstýring til VVM310)

SCA 30 (Sólstýring til VVM500)
RUM 40 (Ekstra betjeningspanel)
RTS 40 (Rúmfølari)






## Útieindir

| **Funktiónir** | **Vølund** **F2120-8** | **F2120-12/16** | **Nibe Split** **AMS 8-10** | **AMS 10-12** |
|---|---|---|---|---|
| Appstýring | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| Frekvensregulering | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| Sera ljóðleys | ✔ | ✔ | | |
| Hægri fram-temp | ✔ | ✔ | | |
| Kølievni millum úti og innipart | | | ✔ | ✔ |
| Til smærri hús og íbúðir | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| Til miðal og størri sethús | ✔ | ✔ | | |
| Sera orkuvinalig | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| Stødd innipartur | 1070 x 1130 x 610 | 1165 x 1280 x 612 | 595 x 780 x 340 | 845 x 970 x 370 |
| Orkuflokkur | **A+++**** | **A+++**** | **A++** | **A++** |


MY UPLINK™
Yvirlit óansæð hvar tú ert
Við NIBE UplinkTM kast tú optimera tína hitanýtslu, spara pening og móttaka fejlmeldingar beinavegin um okkurt er galið við tíni hitapumpu. Stýringin á tíni hitapumpu saman við NIBE UplinkTM appini fært tú eina loysn sum er sera brúkaravinarlig. Appin kann takast niður á Android, iPhone og tablets, um tú ikki hevur eina smartphone ella ein tablet so kanst tú logga inn á NibeUplink.com og har hevur tú somu møguleikar sum í appini.
Optimera hitanýtsluna - sjálvt um tú ikki ert heima
Fá ein alarm um tað er okkurt galið við hitapumpuni
NIBE Uplink er skjótt og lætt at installera
NIBE S1255-6
VENTILATION
Normal
HISTORY: OUTDOOR TEMPERATURE
STATUS
Heating
Scheduling
Away from home
demich
www.demich.fo
sendistovan